## Danska superligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FCK (M) | 33 | 20 - 8 - 5 | 56 | 27 | 29 | 68 |
| 2 | Brøndby (S) | 33 | 20 - 7 - 6 | 55 | 29 | 26 | 67 |
| 3 | Esbjerg | 33 | 18 - 8 - 7 | 71 | 44 | 27 | 62 |
| 4 | OB | 33 | 16 - 9 - 8 | 66 | 46 | 20 | 57 |
| 5 | AaB | 33 | 16 - 9 - 8 | 55 | 41 | 14 | 57 |
| 6 | FCM | 33 | 14 - 6 -13 | 65 | 51 | 14 | 48 |
| 7 | Viborg | 33 | 11 - 9 -13 | 47 | 44 | 3 | 42 |
| 8 | AGF | 33 | 11 - 3 -19 | 45 | 67 | -22 | 36 |
| 9 | FC Nordsj. | 33 | 7 -11 -15 | 35 | 59 | -24 | 32 |
| 10 | Herfølge | 33 | 8 - 7 -18 | 34 | 57 | -23 | 31 |
| 11 | Frem | 33 | 8 - 3 -22 | 40 | 65 | -25 | 27 |
| 12 | AB | 33 | 8 - 2 -23 | 31 | 70 | -39 | 26 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK), Jákup á Borg (OB)

## Danska 1. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Silkeborg | 27 | 19 - 4 - 4 | 62 | 22 | 40 | 61 |
| 2 | Randers FC | 27 | 18 - 3 - 6 | 75 | 39 | 36 | 57 |
| 3 | AC Horsens | 27 | 17 - 5 - 5 | 46 | 22 | 24 | 56 |
| 4 | Køge | 27 | 15 - 7 - 5 | 52 | 36 | 16 | 52 |
| 5 | Sønderjyske E | 27 | 14 - 6 - 7 | 66 | 42 | 24 | 48 |
| 6 | Skjold | 27 | 14 - 4 - 9 | 56 | 45 | 11 | 46 |
| 7 | Ølstykke | 27 | 13 - 3 -11 | 57 | 48 | 9 | 42 |
| 8 | Nykøbing | 27 | 12 - 4 -11 | 42 | 43 | -1 | 40 |
| 9 | FC Nordjylland | 27 | 9 - 8 -10 | 32 | 40 | -8 | 35 |
| 10 | Fredericia | 27 | 8 - 9 -10 | 36 | 38 | -2 | 33 |
| 11 | Fremad Amager | 27 | 8 - 7 -12 | 38 | 47 | -9 | 31 |
| 12 | B 93 | 27 | 6 - 7 -14 | 41 | 46 | -5 | 25 |
| 13 | Vejle | 27 | 6 - 6 -15 | 34 | 56 | -22 | 24 |
| 14 | Brønshøj | 27 | 6 - 6 -15 | 38 | 63 | -25 | 24 |
| 15 | FC Aarhus | 27 | 5 - 3 -19 | 25 | 66 | -41 | 18 |
| 16 | B 1913 | 27 | 2 - 6 -19 | 20 | 68 | -48 | 12 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen,(Vejle), Jann Ingi Petersen, Andrew
av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

## Danska 2. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Dalum | 27 | 16 - 5 - 6 | 63 | 37 | 26 | 53 |
| 2 | HIK | 27 | 15 - 7 - 5 | 57 | 39 | 18 | 52 |
| 3 | Næstved | 27 | 14 - 8 - 5 | 57 | 28 | 29 | 50 |
| 4 | Holbæk | 27 | 12 - 8 - 7 | 56 | 41 | 15 | 44 |
| 5 | Kolding FC | 27 | 12 - 7 - 8 | 46 | 40 | 6 | 43 |
| 6 | Brabrand | 27 | 10 - 8 - 9 | 49 | 39 | 10 | 38 |
| 7 | B1909 | 27 | 11 - 5 -11 | 51 | 44 | 7 | 38 |
| 8 | Slagelse | 27 | 10 - 7 -10 | 48 | 41 | 7 | 37 |
| 9 | Glostrup | 27 | 10 - 4 -13 | 49 | 53 | -4 | 34 |
| 10 | Hjørring | 27 | 10 - 3 -14 | 40 | 70 | -30 | 33 |
| 11 | Jetsmark | 27 | 8 - 8 -11 | 36 | 56 | -20 | 32 |
| 12 | Kalundborg | 27 | 7 - 9 -11 | 53 | 58 | -5 | 30 |
| 13 | Lyngby | 27 | 7 - 9 -11 | 45 | 59 | -14 | 30 |
| 14 | Holstebro | 27 | 8 - 5 -14 | 45 | 57 | -12 | 29 |
| 15 | Skive | 27 | 8 - 4 -15 | 46 | 54 | -8 | 28 |
| 16 | Hvidovre | 27 | 5 - 9 -13 | 29 | 54 | -25 | 24 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)

## Íslendska Landsbankadeildin

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Keflavík | 3 | 2 - 1 - 0 | 6 | 3 | 3 | 7 |
| 2 | Fylkir | 3 | 2 - 1 - 0 | 4 | 1 | 3 | 7 |
| 3 | ÍA | 3 | 1 - 2 - 0 | 3 | 1 | 2 | 5 |
| 4 | ÍBV | 3 | 1 - 2 - 0 | 3 | 2 | 1 | 5 |
| 5 | Fram | 3 | 1 - 1 - 1 | 4 | 3 | 1 | 4 |
| 6 | FH | 3 | 1 - 1 - 1 | 2 | 2 | 0 | 4 |
| 7 | KA | 3 | 1 - 0 - 2 | 2 | 3 | -1 | 3 |
| 8 | KR | 3 | 1 - 0 - 2 | 3 | 5 | -2 | 3 |
| 9 | Grindavík | 3 | 0 - 2 - 1 | 1 | 3 | -2 | 2 |
| 10 | Víkingur R | 3 | 0 - 0 - 3 | 1 | 6 | -5 | 0 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA), Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen (Fram)




*Í fjør kiksaði FCK móti Glasgow Rangers í royndunum at sleppa til Champions League, men nú hava teir so tryggjað sær rættin til enn eina roynd*

# Nú ætlar FCK sær upp í part millum tey stóru

**Fyri triðju ferð í fýra ár var Todi Jónsson leygardagin við til at vinna danska meistaraskapin í fótbólti fyri FCK, sum nú hevur avgjørda málið at spæla við í europeisku meistarakappingini**

ÚTISETAMEISTARI
*Jóannes Hansen*

Todi Jónsson skrivaði leygardagin enn eitt blað í føroyskari fótbóltssøgu. Saman við liðfeløgunum í FCK var hann við til at vinna triðja DM heitið í fýra ár. DM heitið hevði eisini við sær, at FCK vann the double. Hetta var fyrsta ferðin nakrantíð, at ein føroyskur fótbóltsspælari var við til at vinna the double aðra staðni enn í Føroyum.

Todi Jónsson hevði roknað við, at hann fór at vera á beinkinum, tá ið FCK spældi í Farum ímóti FCN, og soleiðis var tað eisini. Í FCK álopinum vóru Jesper Bech og Álvaro Santos, sum Todi loysti av heilt stutt undan leikloki.

– Eg kann einki siga til, at teir báðir fingu møguleikan, og avrikini hjá teimum vístu, at teir vóru verdugir at spæla, staðfestir Todi Jónsson.

FCK vann 4-2 í Farum. Ivi var ongantíð um, hvat liðið var betri. Men í FCK vóru teir løtuna undan steðginum skelkaðir, tá ið FCN burturúr ongum megnaði at svara aftur til 2-2. Í 2. hálvleiki skoraði FCK tvær ferðir, og so vóru Todi og liðfelagarnir heiðraðir bæði á vøllinum í Farum og í Tivoli.

FCM málini hesa ferð vóru frágera góð. Álvaro Santos syrgdi sjálvur fyri 1-0. Hann smoygdi sær millum fleiri mótstøðumenn, slapp leysur við málverjanum og var púra kaldur, tá ið hann setti framvið honum. Jesper Bech økti til 2-0- Eftir framúr neyva og langa sending frá vongverjanum í vinstru, Peter Christiansen, lyfti hann bóltin upp um FCN málverjan. Morten Bisgaard legði FCK framum 3-2 við fínum frísparki úr vinstru, og Jesper Bech staðfesti til 4-2 við vakrasta málinum av øllum, tá ið hann uttanvert brotsteigarmarkið og við vinstra beini úr eitt sindur til høgru smekkaði bóltin upp í handara krókin.

### Brynja seg

Stóra málið hjá FCK er nú at sleppa upp í part í bólkaspælinum í Europa Cup kappingini fyri meistaralið. Tvær tær fyrstu ferðirnar hevur tað ikki riggað. Í fjør kiksaði tað so at siga á strikuni. Eftir at FCK við minnisríka málinum hjá Toda Jónsson í Glasgow hevði megnað 1-1 á útivølli ímóti Rangers, taptu teir á heimavølli.

Í danska fótbóltsheiminum verður mett, at um lutakastið verður heppið, so kunnu teir í FCK kanska sleppa upp í part. Men tað verður torført. Heppið lutakast siga teir í hesum førinum vil siga, at FCK fær eitt nú norska Rosenborg sum mótstøðulið. Men tað eru góðir møguleikar fyri, at FCK skal spæla ímóti eitt nú Manchester United og Liverpool og italskum feløgum, sum avgjørt verða favorittar ímóti FCK.

Í Danmark verður sagt, at FCK hevur ætlanir um í summar at keypa tveir spælarar. Ein verjuspælara og ein miðvallara. Í álopinum verður roknað við, at FCK er nóg væl fyri. Tað hevur ljóðað, at FCK roynir at selja Sibusisu Zuma, men hetta segði leiðslan í felagnum seg í vikuskiftinum ikki kenna nakað til. Tað er kortini einki loyndarmál, at Zuma leingi hevur viljað sloppið at roynt seg aðra staðni, har tað eru fleiri pengar enn í donskum fótbólti.

Tað er rættuliga ivasamt, um Morten Bisgaard fer at halda fram í felagnum. Miðvallarin verður sáttmálaleysur í summar, og nú vil hann sleppa aðra staðni. Hann hevur áður verið í Italia, og um hann nú beinanvegin ikki fer av aftur landinum, so hóttur stór skattarokning, vita donsku miðlarnir at siga.

### Nýggj avbjóðing

Todi Jónsson hevur verið við í meiri enn helmingingum av teimum 33 umførunum í landskappingini, sum tað varð farið undir á Ólavsøku í fjør. Í fyrstu umførunum og í innleiðandi umførunum til Europa Cup var hann rættuliga eyðsýndur og kanska roknaður sum fremsti álopsspælarin av øllum. Síðst í september varð hann skaddur, og skaðin var so mikið treiskur, at Todi ikki slapp upp í part aftur fyrrenn seint í vár, og hann vann sær ongantíð pláss aftur millum teir bestu.

– Hinir álopsspælararnir hava staðið seg framúr væl. Tí hevur tað verið torført hjá mær at sleppa framat, og tað hevur aftur havt við sær, at eg ikki eri komin í røttu dystarvenjingina í vár. Men eg havi gott mót. Eg rokni framvegis við, at eg havi førleika at kappast við hinar um tey bæði plássini í álopinum, sigur Todi Jónsson. Hann og liðfelagarnir í FCK halda frí inntil 24. juni. Tá fara teir at fyrireika seg til nýggja kappingarárið og stóru avbjóðingina í Europa Cup. Í fyrireikingartíðini skulu teir eitt nú spæla í Klaksvík 5. juli og í Gundadali ímóti HB 7. juli.



# Jákup lítla løtu í superliguni

**Tá ið OB tryggjaði sær týdningarmikla fjórða plássið, sum ber við sær, at teir skulu luttaka í Royal Leauge, var føroyski landsliðsmaðurin á vøllinum síðstu lítlu løtuna**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*




*Við seinastu minuttunum í seinasta dystinum hjá OB hetta kappingarárið, gjørdist Jákup á Borg tíggjuni føroyingurin í bestu donsku fótbóltsdeildini á harrasíðuni*

Burtursæð frá tí sindrinum, sum var av spenningi um, um nú FCK fór at megna at vinna í Farum, ella um teir fóru at snáva og Brøndby harvið fór at fáa møguleikan at vinna DM, so var ikki so nógv at telvast um á síðsta leikdegi. Esbjerg hevði tryggjað sær bronsumerkini, og tað var greitt, at AB og Frem skuldu flyta niður.

Jákup á Borg var í OB hópinum, og hann slapp fyri fyrst ferð upp í part, tá ið hann segði farvæl við OB — fyribils í hvussu so er. OB hevði vitjan av Herfølge, sum Jákup á Borg síðsta heyst royndarvandi í. Tað stóð leingi nógv á hjá OB. Eitt korter undan leikloki fingu teir hol á, og so vunnu teir 4-0. Tað ber við sær, at teir vunnu fjórða plássið, sum gevur atgongd til tað, teir kalla Royal Leauge. Hetta er kapping millum fýra tey bestu liðini í Danmark, Svøríki og Noregi, sum tað fyri fyrstu ferð verður farið undir í heyst.

Jákup á Borg varð í 89. minutti settur á vøllin fyri Mwape Miti. Harvið skrivaði Jákup seg á alt longri listan yvir føroyskar spælarar, sum hava roynt seg í bestu donsku kappingini. Umframt Henrik Thomsen og Ábraham Løkin, sum spældu við ávíkavíst B93 og OB fyri 20-25 árum síðani, tá ið besta danska deildin nevndist 1. deild, so eru á listanum Todi Jónsson, Jákup Mikkelsen, Jan Allan Muller, Óli Johannesen, Johan Byrial Hansen, Christian Høgni Jacobsen og Jón Rói Jacobsen. Hesir sjey seinast nevndu hava saman við Jákupi á Borg roynt seg í superliguni, sum besta danska deildini hevur verið nevnd seinastu tólv árini.

### Vónbrot í Brøndby

Tá ið tað í mars varð farið undir síðsta triðingin av hesum kappingarárinum, var Brøndby átta stig framman fyri FCK. Í fyrsta umfarinum eftir vetrarsteðgin tapti Brøndby stórt ímóti Esbjerg. Harvið var møguleikin fyri spennandi kappingarenda størri. Tað hevur ikki gingið væl hjá Brøndby, men leygardagin vunnu teir síðsta heimadystin. Eingin í Brøndby duldi kortini fyri, at teir vóru vónbrotnir, at tað vóru silvur og ikki gullkrónurnar, sum teir fingu um hálsin.

Brøndby hevði vitjan av langt síðani niðurflutta AB. Gestirnir løgdu seg á odda, men undan steðginum hevði heimaliðið skorað tvær ferðir. 19.632 áskoðarar vóru í Brøndby. Teir vóru ovurfegnir, tá ið tað fréttist, at FCN hevði javnað til 2-2 ímóti FCK í Farum. Tá var Brøndby oddalið og harvið á meistarakós. Men so gekk tað, sum tað kundi roknast við. FCK vann í Farum, og harvið stóðu Brøndby spælararnir við silvur krónunum.

Esbjerg var eitt skifti í vár á meistarakós. So taptu teir fýra dystir á rað og endaðu á bronsuplássinum. Eftir 6-3 á heimavølli ímóti Frem søgdu teir í Esbjerg seg vera fegnar um bronsukrónurnar. Teir megnaðu ikki at spæla seg í UEFA Cup. Í staðin skulu teir spæla í Intertoto Cup, har mótstøðuliðið verður NSÍ!

AaB gjørdi bart á heimavølli ímóti FCM, sum varð sent aftur til Herning við 3-1 tapi. David Nielsen, sum í miðlunum hevur verið nógv umrøddur, tí hann í vedding hevur spælt seg út á sjógv, skoraði øll trý AaB málini. AaB ætlaði sær fjórða plássið, men tað kiksaði, tá ið OB og Jákup á Borg vunnu. AaB skal kortini spæla í UEFA Cup. Tað skulu teir sum taparar í steypafinaluni ímóti FCK, ið sum meistaralið skal luttaka í meistarakappingini.

### Flytir vestureftir

Viborg vann 2-0 í Århus, har AGF legði enn eitt klípi afturat ógvuliga vánaliga kappingarárinum. Tá ið svenski Søren Åkeby kom til Århus í oktober, slerdi hann í stórutrummu og segði, at AGF skuldi broytast til eitt vinnaralið og harvið boð upp á meistaralið. Nú tykist lítil kredittur vera eftir.

Hóast Herfølge og FCN taptu hesa ferð, so høvdu teir undan tveimum teimum síðstu umførunum tryggjað sær enn eitt ár í bestu deildini. AB og Frem fluttu niður í næstbestu deildina. Í Danmark verður tosað um, at fótbóltskortið verður eitt sindur meiri vent vestureftir. Tá verður sipað til, at tvey lið av Sjællandi flyta niður, og at tvey lið úr Jyllandi fara at flyta upp í bestu deildina.

# Andrew hevur fingið um endan

**Johan Byrial Hansen og Horsens stríddu seg til nýggjan møguleika at flyta upp, tá ið teir vunnu sannførandi á oddaliðnum**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Pílurin vendi hesa ferð rætta vegin hjá øllum feløgunum, sum hava føroyska umboðan. Eingin av føroysku spælarunum í Fremad Amager var á vøllinum allar 90 minuttirnar. Men tað tykist sum um, at tað gongur rætta vegin. Serliga hjá Andrew av Fløtum, sum aftur hesa ferð var málskjútti. Randers FC, sum leingi hevur havt beina kós í superliguna, vitjaði í Sundby. Hjalgrím Elttør og Andrew av Fløtum vóru millum teir fyrstu ellivu, meðan Jann Ingi Petersen kom á vøllin, tá ið seinna umfarið var hálvrunnið.

Andrew av Fløtum legði Fremad Amager á odda í 38. minutti, tá ið hann úr vinstru sendi umvegis stólpan og í málið. Í 53. minutti økti Fremad Amager eftir horna, og í 68. minutti minkaði Randers um munin. Hjalgrím Elttør varð skiftur út í 62. minutti, og Andrew fór av vøllinum, tá ið tað restaði eitt korter.

Við óvæntaða sigrinum tryggjaði Fremad Amager sær enn eitt ár í næstbestu deildini.

At Randers tapti í Sundby hevði við sær, at Johan B. Hansen og liðfelagarnir við sigri í heimadystinum ímóti oddaliðnum, Silkeborg, aftur kundu nærkast uppflytingini. Horsens vann 4-2. Johan B. Hansen var alla tíðina á vinstra vongverjanum, sum hann hevur røkt tær seinastu nógvu ferðirnar. Silkeborg javnaði til 1-1, eftir at Horsens við framúr frísparki hevði lagt seg framum. Eftir steðgin var Horsens sum eitt ódnarveður.

Horsens sigurin og Randers tapið hava við sær, at Randers nú bara er eitt stig undan Horsens. Í Silkeborg høvdu teir vónað, at uppflytingin fór at gerast veruleiki hesa ferð, men nú mugu teir bíða í hvussu so er eina viku.

Felagið hjá langtíðarskadda Christian Høgna Jacobsen, Vejle, hevur í fleiri vikur verið niðan fyri keðiligu strikuna. Tað var alneyðugt hjá teimum at vinna í Nykøbing Falster, og tað eydnaðist. Vejle vann 2-0, og tá ið Brønshøj samstundis tapti 2-1 á heimavøllinum í Tingbjerg ímóti FC Nordjylland, lyfti Vejle sær upp um strikuna. Men talan er um tætta kapping. Tað er bara málmunurin, sum skilur Vejle og Brøndhøj.

B1913 tapti 8-0 á Eysturbrúgv ímóti B93, sum framvegis er í vanda fyri at flyta niður. Við stórtapinum er B1913 endaliga fokið. Hjá FC Aarhus skal tað meiri til, enn tað ber til at ímynda sær, at teir kunnu megna fyri at bjarga sær. Hesa ferð tapti FC Aarhus 3-0 á heimavølli ímóti Skjold.




*Andrew av Fløtum var aftur á málskjúttaralistanu, tá Fremad Amager við 2-1 sigri á Randers Freja skræddi leyst av botninum*